# VEGLEIÐING UM VIÐGERÐARTRYGD

November 2021

2. útgáva

Dátueftirlitið

# Innihaldsyvirlit


1. Fororð ....................................................................................................2

2. Hvat er viðgerðartrygd ? ......................................................................3

3. Krøv til viðgerðartrygd.........................................................................4

3.1 Hóskandi trygdarstøði...........................................................................4

3.2 Váðagrundað tilgongd............................................................................6

3.3 Hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk..................................................7

3.3.1 Dulnevndar(pseudonymar) og bronglaðar upplýsingar (dømi 1)..................9

3.3.2 Tryggja áhaldandi trúnað, integritet, atkomu og haldføri (dømi 2) ............ 10

3.3.3 Rættstundis atkoma og atgongd til persónupplýsingar (dømi 3)................ 11

3.3.4 Mannagongdir (dømi 4) ..................................................................... 12

3.3.5 Bygnaðarlig tiltøk ............................................................................ 12

4. Stutt vegleiðing til at halda krøvini um viðgerðartrygd............................................ 15

4.1 Dátuábyrgdari skal seta tiltøk í verk sum tryggjar hóskandi trygdarstøði........... 15

4.1.1 Stig 1: Staðfesting og meting av váða ................................................. 15

4.1.2 Stig 2: Staðfesting av møguligum tiltøkum .......................................... 16

4.1.3 Stig 3: Gjøgnumgongd av tiltøkum sum tryggja hóskandi trygdarstøði........... 17

4.1.4 Stig 4: Íverksetan av valdum tiltøkum................................................. 17

5. Samanumtøka .................................................................................... 18

# 1. Fororð

Hendan vegleiðing er skrivað til tín, sum er dátuábyrgdari ella dátuviðgeri, og hevur brúk fyri at vita hvussu nøktandi víðgerðartrygd fast.

Um tú hevur ábyrgd av eini dátuviðgerð, skalt tú leggja teg eftir, at upplýsingarnar eru tryggjaðar í hóskandi mun. Um trygdin ikki er nøktandi, kunnu upplýsingarnar forfarast ella koma á skeivar hendur. Upplýsingar á skeivum hondum kunnu verðar brúktar óheimilað, og t.d. verða lisnar, broyttar ella strikaðar av óviðkomandi.

# 2. Hvat er viðgerðartrygd ?

### Hóskandi trygdarstøði er grundað á ítøkiliga meting av sannlíku váðunum

Viðgerðartrygd er ásett í § 46 í dátuverndarlógini. Tann, sum hevur ábyrgd av eini dátuviðgerð, skal tryggja eitt hóskandi trygdarstøði, og hetta skal grundast á eina heildarmeting. Í heildarmetingini skal hædd takast fyri tøkniliga støðinum, verksetanarkostnaðinum, slagi av viðgerð, vavi, samanhangi og endamáli. Umframt hetta, skal eisini hædd takast fyri teimum sannlíku váðunum, sum ein viðgerð kann hava við sær, sæð í mun til rættindi teirra skrásettu.

Tá atlit eru tikin til hesi viðurskifti, skal eitt hóskandi tøkniligt og bygnaðarligt trygdarstøði ásetast, sum skal standa sum verja fyri váðunum. Her krevst ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri. Tað er ein fortreyt, at krøv verða sett til trygdarstøðið, og at hesi krøv standa í hóskandi mun til tann váða, sum ein ávís viðgerð av persónupplýsingum hevur. Eitt hóskandi trygdarstøði skal forða fyri, at viðgerð fer fram, sum er í stríð við lógina.

# 3. Krøv til viðgerðartrygd

**Fyri at minka um váðarnar skulu dátuábyrgdari og dátuviðgeri seta tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk**

Fyri at hava nøktandi trygd og t.d. forða fyri ólógligari viðgerð, skal dátuábyrgdari ella dátuviðgeri meta um váðarnar, sum ein viðgerð hevur við sær. Síðani skal støða takast til møgulig tiltøk sum kunnu viga upp ímóti og avmarka vandar. Her kann bronglan (kryptering) nevnast sum eitt dømi.

Yvirskipað kunnu persónupplýsingar býtast í tvinnar bólkar. Hesir bólkar eru vanligar upplýsingar og viðkvæmar upplýsingar. Trygdarkravið er størri, tá talan er um viðkvæmar persónupplýsingar. Trygdarstøðið er treytað av umstøðum, so sum sannlíkindum fyri, at ymisku váðarnir koma fyri. Ein váði kann gerast størri um nógvar upplýsingar verða viðgjørdar – ein størri mongd av upplýsingum kann merkja, at "vinningurin" er størri fyri ein óviðkomandi, sum sleppur framat upplýsingunum. Við hesum gerast sannlíkindini eisini størri fyri, at óviðkomandi royna at sleppa framat upplýsingunum.

Trygdartørvurin skal metast eftir teimum upplýsingum sum verða viðgjørdar. Um fleiri ymisk sløg av persónupplýsingum verða viðgjørdar saman, skulu trygdartiltøkini ásetast eftir mest viðkvomu upplýsingunum. Sjálvur hátturin, sum upplýsingar vera viðgjørdar eftir, kann eisini ávirka, hvussu trygdin skal skipast. Um t.d. tú profilerar[1] við vanligum persónupplýsingum, er krav um betri verju enn við øðrum sløgum av viðgerð.

## 3.1 Hóskandi trygdarstøði

Dátuverndarlógin krevur, at viðgerð av persónupplýsingum skal hava eitt hóskandi trygdarstøði. Avgerandi fyri, hvar trygdarstøðið skal leggjast, er váðin, sum stendst av viðgerðini. Her krevst ein ítøkilig meting, og í hesi metingini skal takast hædd fyri møguleikanum, at persónupplýsingar av tilvild ella ólógliga verða burturbeindar,

[1] Profilering er automatisk viðgerð av persónupplýsingum við tí endamáli at brúka upplýsingarnar til at meta um ávís viðurskifti hjá einum persóni.

burturmistar, ella broyttar. Eisini skal hædd takast fyri, at óviðkomandi ikki fáa kunnleika til persónupplýsingarnar.

Eitt hóskandi trygdarstøði skal metast eftir, hvør váðin er, og hvussu stórur hesin váði er. Tá eitt hóskandi trygdarstøði skal leggjast, eigur tú at byrja við at greina, hvørjir váðar eru í viðgerðini.

Ein váði skal lýsast ítøkiliga. Harnæst skal greinast, hvussu hesin váði kann ávirka rættindini hjá einum skrásettum og síðani, hvussu sannlíkt tað er, at váðin kemur fyri.

**Dømi um yvirskipaðar váðar sum ein viðgerð av persónupplýsingum kann hava við sær:**

- **Tilvildarlig ella ólóglig striking**
- **Tilvildarligur ella ólógligur missur**
- **Tilvildarlig ella ólóglig broyting**
- **Óheimilað víðarilatan**
- **Óheimilað atgongd**

**Dømi uppá ítøkiligar váðar sum ein viðgerð av persónupplýsingum kann hava við sær:**

- **Phising**
- **Malware**
- **Ransomeware**
- **Mistur krypteringslykil**
- **Ónøktandi kryptering**
- **Mist backup**
- **Vantandi mannagongd fyri endurskapan**
- **Vantandi innanhýsis vitan um handfaring av persóndata og kt-skipanum o.a.**

## 3.2 Váðagrundað tilgongd

Dátuverndarlógin byggir á eina váðagrundaða tilgongd til vernd av persónupplýsingum. Hetta hevur við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin, í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum, skulu meta um váðarnar sum viðgerðin kann hava við sær. Neyðugt er at fáa greiðu á, hvør váði kann standast av viðgerðini, og hvørji trygdartiltøk eru neyðug í hesum sambandi.

Tað avgerandi er, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin gera eina heildarmeting av viðgerðini, kringumstøðunum og váðunum fyri tann einstaka.

Ein fyrimunur við hesi tilgongd er, at tann umsitingarliga byrðan hjá dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum í útgangsstøðinum verður lættari, tí byrðar einans verða álagdar, tá hetta verður mett neyðugt. Váðagrundaða tilgongdin til dátuvernd hevur við sær, at jú størri váðin er, jú hægri eru krøvini til trygdina.

Váðagrundaða tilgongdin krevur eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Er ein váði við viðgerðini, so skal hesin takast við í samlaðu metingina. Um váðin er stórur, skal støða takast til, hvørji trygdartiltøk skulu setast í verk, og tá skal hædd m.a. takast fyri verandi tøkniliga støði, verksetanarkostnaði, slagi av viðgerð og slagi av upplýsingum. Eisini vavi, samanhangur, endamálið við viðgerðini og týðandi rættindi hjá einstaklingum skal takast við í metingina.

Váðagrundaða tilgongdin merkir, at tú støðugt skal taka hædd fyri møguligum váðum. Hetta merkir eisini, at tú áhaldandi skal eftirmeta og greina trygdarstøðuna. Trygdarstøðið verður sostatt lagt í mun til ítøkiligu váðarnar. Váðagrundað tilgongd er kend frá ymiskum ISO standardum til at stýra KT-trygd.[2] Ein váðameting skal gerast og her skulu avleiðingarnar fyri tann einstaka takast við.

[2] Tvey dømi um hesar standardir eru: ISO 27001 og ISO 29134

**Avleiðingar fyri tann skrásetta kunnu vera:**

- **Missmunur**
- **Samleikastuldur**
- **Samleikasvik**
- **Peningaligur missur**
- **Umdømisskaði**
- **Sosialar avleiðingar**
- **Ávirkan á privatlív**
- **Skaði á menniskjaliga tign**
- **Skaði á sjálvsøgd áhugamál**
- **Avmarking/brot á frælsisrættindi**
- **Forðan fyri eftirliti við egnum persónupplýsingum**

## 3.3 Hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk

Dátuverndarlógin ásetir, at tú skal fremja hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, so til ber at tryggja eitt trygdarstøði, sum hóskar til staðfesta váðan.

Í § 46, stk. 1 í dátuverndarlógini eru ásett nøkur dømi um trygdartiltøk, sum dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin kunnu seta í verk. Talan er um dømi, og sostatt er upp til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran at meta um, hvørt eitt ella fleiri av nevndu tiltøkunum skulu setast í verk ella um tað eru heilt onnur tiltøk, sum eru neyðug til ta viðgerðina, sum skal fara fram. Hvørji tiltøk eru best egna at seta í verk, veldst um slagið av viðgerðum og váðum sum viðgerðin hevur við sær.

Dátuverndarlógin ásetir sostatt ikki, júst hvørji tiltøk skulu veljast. Valið er títt og tú hevur ábyrgd av at ávísa og skjalfesta, at tær persónupplýsingar, sum tú varðar av, verða viðgjørdar á tryggan hátt.

Fyri at leggja rætta trygdarstøðið, er neyðugt fyrst at fáa váðarnar, sum er knýttir at viðgerðini av persónupplýsingum, fram í ljósið. Her er neyðugt at gera eina váðameting sum tekur støðið í eyðmerktu váðunum. Her verður dentur lagdur á, hvussu tú, sum dátuábyrgdari ella dátuviðgeri, kann finna fram til hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, so

kravið um viðgerðartrygd verður hildið. Tá tú hevur mett um váðan setur tú neyðugu tiltøkini í verk, sum mótvekt til váðarnar.

**Dømi um tøknilig tiltøk:**

- **Virusverja**
- **Firewall**
- **Antispam og –phising filtur**
- **Endpoint security**
- **Tiltøk so til ber at kanna hvør hevur viðgjørt persónupplýsingar (logging)**
- **Bronglan og dulnevning av persónupplýsingum**
- **Áhaldandi dagføring av ritbúnaði**
- **Atgongd grundað á fleiri loyniorð**
- **Flokka upplýsingarnar**
- **Uppbýtt net og avbyrging**
- **Skráseting av avvístari atgongd**

**Dømi um bygnaðarlig tiltøk:**

- **Yvirlit yvir viðgerðir**
- **Váðameting**
- **Reglur um tagnarskyldu**
- **Tilnevning av dátuverndarfólki – eisini tá hetta ikki er krav sambært lógini.**
- **Innanhýsis reglur um bygnaðarlig viðurskifti og fysiska trygd, t.d. trygdarskipan, avmarking ella eftirlit við atgongd, góðkenningarskipanir.**
- **Tiltøk, sum tryggja, at einans persónar, sum hava heimild, kunnu fáa atgongd til persónupplýsingar.**
- **Leiðreglur um, hvussu dátuábyrgdarin hevur eftirlit við trygdartiltøkum.**
- **Nøktandi vegleiðing og upplæring til starvsfólkið.**
- **Reglulig skoðan og eftirlit við tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkunum.**

Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu sjálvir meta um, hvørji trygdartiltøk eru neyðug í mun til eina ávísa viðgerð, og gera av, hvørji tiltøk skulu setast í verk. Tað avgerandi er, at tiltøkini svara til tann váða, sum viðgerðin hevur við sær.

Tað er eisini umráðandi, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin hava skjalprógv fyri, hvørji trygdartiltøk eru sett í verk, sbrt. § 44 í dátuverndarlógini um yvirlit. Skjalprógv skal m.a. brúkast í sambandi við eftirlit hjá Dátueftirlitinum. Sbrt. § 44 er tað eitt krav, at tú lýsir tey tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkini, sum eru sett í verk.

### 3.3.1 Dulnevndar(pseudonymar) og bronglaðar upplýsingar (dømi 1)

Eitt dømi uppá eitt tiltak, ið kann brúkast til at hækka um trygdina, tá viðgerð av persónupplýsingum fer fram, er dulnevning og bronglan.

Ein upplýsing er dulnevnd, tá tú viðgerð persónupplýsingarnar soleiðis, at tú ikki veit, hvør tann skrásetti er, uttan so at tú brúkar eyka upplýsingar. Her er fortreytin, at eyka upplýsingarnar verða goymdar fyri seg, og at tær verða goymdar trygt. Verða hesar fortreytir hildnar, ber ikki til uttan víðari at finna fram til tann skrásetta.

Dulnevning kann t.d. gerast við at skifta nøvnini á persónum um við kotur. Hesar kotur kunnu finnast aftur á einum serstøkum lista, og soleiðis ber til at síggja sambandi millum navnið á einum persóni og ávísu kotuna. Tað er ikki møguligt fyri óviðkomandi at endurskapa sambandið millum navn og kotu.

Dulnevndar upplýsingar geva eina betri verju fyri skrásetta, tí at tað ikki ber til hjá óviðkomandi beinleiðis at kenna skrásetta aftur.

Dulnevndar persónupplýsingar eru at rokna sum persónupplýsingar og sostatt fevndar av dátuverndarlógini. Eru persónupplýsingar hinvegin anonymiseraðar (navnleysar), so at skrásetti ikki longur kann eyðmerkjast, eru upplýsingarnar ikki longur fevndar av dátuverndarlógini.

Við bronglan gerast útvaldar upplýsingar ólesiligar. Her vera loyniligir lyklar (krypteringslyklar) brúktir, og fyri at kunna lesa upplýsingarnar, er neyðugt at hava tann

rætta lykilin. Um tú brúkar "sterka" bronglan og skipar hetta tiltakið rætt, minkar váðin fyri skrásetta, og upplýsingarnar eru tá betri vardar.

Bronglan av persónupplýsingum hevur – eins og dulnevning – við sær, at óviðkomandi ikki skilja tær uttan víðari, tí at eyka upplýsingar eru neyðugar fyri at gera upplýsingarnar skiljandi.

Bronglan er eitt dømi um trygdartiltak og er ikki eitt krav. Tó eiga persónupplýsingar, sum verða fluttar elektroniskt við flutningsmiðlum uttan fyri fysiska eftirlitið hjá dátuábyrgdaranum, í útgangsstøðinum at vera brongladar um trúnaður er neyðugur. Hetta hevur við sær, at viðkvæmar persónupplýsingar, ið ikki eru brongladar, ikki eiga at verða sendar gjøgnum eitt net, sum dátuábyrgdari ikki hevur fult tamarhald á. Tí eiga teldupostar við viðkvomum persónupplýsingum í ávísum førum at verða sendir brongladir umvegis internetið. Sí eisini avgerð frá Dáturáðnum df. 11. februar 2021[3].

### 3.3.2 Tryggja áhaldandi trúnað, integritet, atkomu og haldføri (dømi 2)

Næsta dømi uppá tiltøk, sum dátuverndarlógin beinleiðis nevnir, er evni at tryggja áhaldandi trúnað, integritet, atkomu og haldføri á viðgerðarskipanum og viðgerðartænastum. At dátuábyrgdarin áhaldandi skal tryggja hetta vísir, at dátuvernd ikki er statisk, men kann broytast við tíðini, og at trygdartiltøkini tí støðugt eiga at verða endurmett.

***Trúnaður*** merkir at skipa soleiðis fyri, at einans tey starvsfólk, sum í sínum starvi hava tørv á at viðgera upplýsingarnar, fáa atgongd til upplýsingarnar.

***Integritetur*** merkir, at upplýsingarnar skulu vera rættar. Tað skal vera møguligt at kanna, um upplýsingarnar eru rættar, og skipanirnar eru álítandi og fullfíggjaðar. Tøkniliga snýr integritur seg um, at tær upplýsingar sum liggja í skipanunum ikki broytast, um tær t.d. verða goymdar, uttan so at tað er ætlanin. Dømi uppá trygdartiltøk í mun til integritet kunnu nevnast sum talgild undirskrift, loyniligar kotur hjá einstaklingum og VPN-sambond.

Við ***atkomu*** er at skilja, at viðgerðarskipanir og viðgerðartænastur altíð eru atkomuligar fyri góðkendar brúkarar. Atkoma merkir eisini, at tað er gjørligt at endurskapa upplýsingar, sum

[3] https://www.dat.fo/avgerdir/samskifti-umvegis-teldupost

eru strikaðar antin tilvildarliga ella ólógliga. Hetta kann gerast við at tryggja eina vælvirkandi backup-skipan ella við at hava eyka skipanir, um tað er neyðugt. Tá umræður slík tiltøk, er tað vanliga ein fortreyt, at tað samstundis er fastløgd ein bygnaðarlig mannagongd fyri, hvussu hesar uppgávur loysast, og hvussu t.d. backup verður testað.

***Haldføri*** er evni at tryggja tað tøkniliga og bygnaðarliga mótstøðuføri í viðgerðarskipanum og viðgerðartænastum t.d. við at tryggja tær ímóti skaðiligum tilburðum. Hetta kann vera við at tryggja ambætarar ímóti slíkum so sum: feili í diski, í køling ella í neyðstreymi og annað.

### 3.3.3 Rættstundis atkoma og atgongd til persónupplýsingar (dømi 3)

Eitt triðja dømi uppá eitt tiltak, sum dátuverndarlógin nevnir, eru føri til rættstundis at fáa í rættlag atkomu og atgongd til persónupplýsingar eftir fysiskan ella tøkniligan tilburð. Í hesum liggur, at tað finst ein tilbúgving sum lýsir, hvussu atgongd til persónupplýsingar endurskapast, tá fysiskar ella tøkniligar hendingar fara fram.

Av fysiskum tilburðum kunnu nevnast eldsbruni ella slitnaðir káplar til telesamskifti. Tøkniligar hendingar kunnu vera at KT-umhvørvið er fyri hacking ella ransomeware. Tá talan er um ransomeware, so bronglar áloyparin tínar fílur og krevur síðani gjald fyri dekrypteringslykilin (rekingarlykilin). Tá malware (illbúnaður) sleppur inn á eina teldu, kann tað spjaða seg til aðrar teldur, sum eru knýttar at netinum, og hetta ger tað trupult ella ógjørligt at arbeiða vanligt.

Tað er týdningarmikið at hava eina ætlan fyri, hvussu KT-raksturin í slíkum førum kann endurskapast innanfyri eitt givið tíðarskeið, men eisini at hava eina ætlan fyri, hvussu best slepst undan at vera raktur av t.d. tøkniligum hendingum. Tað kundi verið talan um at taka reglulig trygdaravrit, ella at avmarka brúkið av plugin (ískoytisforrit) til kaga, ella at tú í øðrum førum brúkar eina alternativa samskiftislinju til dátuviðgerð.

Við venjingum og royndum ber til at vísa evni til at endurskapa persónupplýsingar ella KT-umhvørvið rættstundis.

### 3.3.4 Mannagongdir (dømi 4)

Fjórða dømi uppá eitt viðkomandi tiltak, sum dátuverndarlógin nevnir, er mannagongdir til regluliga royndarkanning, meting, eftirmeting av virkisføri í sambandi við tøkniligu og bygnaðarligu tiltøkini, sum tryggja viðgerðartrygd.

Hetta hevur m.a. við sær, at dátuábyrgdarin og dátuviðgerin við jøvnum millumbilum royna og meta um tey tiltøkini sum tryggja viðgerðartrygd.

Her verður miða eftir, at tú javnan roynir, metir og eftirmetir – treytað av um hetta er viðkomandi – firewalls, bronglað sambond, bronglaðar goymslur av upplýsingum o.l. Viðkomandi royndir kundu verið t.d. at overva KT-skipanir, at finna fram til loyniorð hjá brúkarum, atgongd til innanhýsis net o.a.

### 3.3.5 Bygnaðarlig tiltøk

Bygnaðarlig tiltøk kunnu – saman við tøkiligum tiltøkum – eisini gerast partur av tíni loysn, soleiðis at reglan í § 46 í dátuverndarlógini verður hildin. Her skal ein javnvigan gerast, tá tú skal meta um, hvørji hóskandi trygdartiltøk skulu setast í verk. Tú skal í hesum sambandi taka atlit til verandi tøkniliga støði og verksetanarkostnaðin.

**Dømi um bygnaðarlig tiltøk:**

**Tú skalt – treytað av, at tú eftir ítøkiligari meting kemur fram til, at tað er neyðugt fyri at koma á hóskandi trygdarstøði – fremja bygnaðarligar loysnir. Hetta kann vera undirvísing av starvsfólki, áhaldandi at svara spurningum frá starvsfólkum um dátutrygd, ella aðrar líknandi innanhýsis mannagongdir í mun til KT-trygd.**

**Um tað vísir seg, at verksetanarkostnaðurin, sum er knýttir at dagføra eina *gamla skipan,* ið ikki er á hædd við tað aktuella tøkniliga støðið, er ósamsvarandi í mun til kostnað, ber til at økja trygdina við bygnaðarligum tiltøkum. Tað er sostatt ikki eitt krav, at trygdarkrøvini skulu lúkast tøkniliga, um niðurstøðan eftir eina ítøkiliga meting frá dátuábyrgdara er, at tað er nóg mikið við bygnaðarligum loysnum.**

**Um tað við innanhýsis mannagongdum, undirvísing av starvsfólki ella líknandi bygnaðarligum tiltøkum ber til at røkka eitt hóskandi trygdarstøði, sjálvt um eldri skipanir vera brúktar, er hetta í útgangsstøðinum nøktandi.**

Dátuverndarlógin bjóðar fram ein “amboðskassa” við fleiri ítøkiligum dømum uppá trygdartiltøk, sum til ber at brúka.

**Tiltøk sum eru beinleiðis nevnd í dátuverndarlógini ella viðmerkingunum til lógina:**

- **Tøknilig og bygnaðarlig tiltøk sum tryggja at viðgerðin er í samsvari við lógina.**
- **Tiltøk sum tryggja, at tað er gjørligt at kanna og staðfesta um, og hvør, ið hevur viðgjørt persónupplýsingar (loggur).**
- **Sjálvboðið val av dátuverndarfólki.**
- **Áseting av innanhýsis reglum um bygnaðarlig viðurskifti og fysiska trygd, her undir trygdarskipan, umsiting av atgongd, heimildarskipan, og eftirlit av heimildum.**
- **Tiltøk at tryggja, at bert teir persónar, við heimild frá dátuábyrgdara, har tað er neyðugt fáa atgongd til persónupplýsingarnar.**
- **Áseting av leiðreglum fyri eftirlitið hjá dátuábyrgdara til at tryggja at framdu trygdartiltøkini verða hildin.**
- **Neyðug leiðbeining frá dátuábyrgdara til starvsfólk sum viðgera persónupplýsingar**
- **Tiltøk – á støðum har viðger av persónupplýsingum fer fram – við tí fyri eyga at forða óviðkomandi at sleppa framat upplýsingunum.**
- **Dulnevning av persónupplýsingum.**
- **Bronglan av persónupplýsingum.**
- **Tryggja loynd, integritet, atgeingi, haldføri av viðgerðarskipanum og tænastum í sambandi við viðger av persónupplýsingum.**
- **Tryggja trygd av viðgerð, við regluligari meting og eftirmeting av tøkniligum og bygnaðarligum tiltøkum.**
- **Skráseting av avvístum royndum til atgongd og tøknilig tiltøk, sum kunnu tryggja forðan fyri enn fleiri slíkum royndum um neyðugt.**

**Onnur dømi um tiltøk:**

- **Fysisk trygd**
- **Bygnaðarlig viðurskifti**
- **Tøknilig viðurskifti í skipanum**
- **Útbúgving**
- **Tryggja bygningar og hølí**
- **Formlig góðkenning av brúkarum**
- **Atlát (loyniorð)**
- **Nýtsluhagtøl**
- **Loggur til transaktiónir**
- **Skráseting av óheimilaðum royndum at logga á**
- **Reglur fyri útskriftum**
- **Reglur fyri burturbeining**

Einstaka starvsfólkið kann eisini vera ein møguligur váði. Tí er neyðugt, at øll starvsfólk skilja, hvussu persónupplýsingar viðgerast lógliga. Eisini skal gerast starvsfólkunum greitt, at í hesum sambandi hava tey eina ábyrgd mótvegis arbeiðsgevara.

Sum ein partur av viðgerðartrygdini, skulu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin tryggja, at tann, sum arbeiðir fyri dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran, einans viðger hesar upplýsingar eftir boðum frá dátuábyrgdaranum.

# 4. Stutt vegleiðing til at halda krøvini um viðgerðartrygd

Her verður greitt frá, hvussu tú við fýra stigum kanst fara fram, tá tú skalt staðfesta, meta um og fremja trygdartiltøk sum skulu til fyri at lúka treytina um viðgerðartrygd.

## 4.1 Dátuábyrgdari skal seta tiltøk í verk sum tryggjar hóskandi trygdarstøði

Tú, sum dátuábyrgdari, ger sjálvur av, hvussu farast skal fram við at skipa hesi viðurskifti, og hetta er bert eitt uppskot hvussu hetta kann gerast.

Metingar um viðgerðartrygd og tiltøk er eitt arbeiði, sum skal gerast regluliga, tí vandamyndin broytist alsamt. Hetta er orsakað av tøkniligum og bygnaðarligum broytingum innanhýsis hjá tær sum dátuábyrgdara, men eisini orsakað av áhaldandi hóttanunum frá umheiminum.

### 4.1.1 Stig 1: Staðfesting og meting av váða

Tað er ein stórur fyrimunur, um tú veit hvussu persónupplýsingar, sum tú hevur, vera viðgjørdar. Tú skal vita hvørji amboð verða brúkt til viðgerðina og í hvørjum høpi viðgerðin verður framd. Tú skal vita, ítøkiliga hvørjar upplýsingar tú hevur, hvar tær liggja, hvussu tú viðger tær, og hvussu upplýsingarnar vera fluttar millum skipanir.

Her er viðkomandi at fáa greiðu á:

- Hvørjar skipanir verða brúktar ?
- Hvør hevur ábyrgd av skipanunum (tú ella ein veitari) ?
- Hvussu virkar skipanin (endamál og virkisføri) ?
- Verða upplýsingarnar heintaðar frá øðrum skipanum og um ja, so hvørjum ?

Tá tú hevur fingið greiðu á hesum, kanst tú staðfesta hvørjir váðar eru í viðgerðini, sum kunnu raka tey skrásettu. Tað kann í hesum sambandi vera neyðugt at kanna váðarnar

nágreiniliga, og møguliga gera eina avleiðingargreining[4], um stórur møguleiki er fyri, at trygdin hjá skrásettum persónum er í vanda.

**Dømi 1 um váða:**

**Tá persónupplýsingar skulu flytast úr einum staði í eitt annað, er vandi fyri at onkur óviðkomandi kann sleppa framat upplýsingunum. Tað kann henda, at avlurting fer fram. Hetta kann fara fram antin hjá sendara ella hjá móttakara, ella á sjálvum netinum, sum verður brúkt til at flyta persónupplýsingar.**

**Dømi 2 um váða:**

**Í Cloud-loysnum er vandi fyri at missa tamarhald á upplýsingum. Í hesum loysnum verður eftirlitið í stóran mun lati í hendurnar á útbjóðaranum av Cloud-loysnini. Hetta kann hava týdning fyri trygdina. Her kann koma fyri, at t.d. óviðkomandi sleppa framat upplýsingunum "í skýnum" ella at fysiskar ella tøkniligar hendingar koma fyri, so dátuábyrgdarin ikki sjálvur sleppur framat upplýsingunum. Tað er sostatt av týdningi, at tú í dátuviðgerðaravtaluni staðfestir, júst tað eftirlit, sum er neyðugt fyri tína viðgerð, og eisini at tú hevur møguleika at fylgja við ymisku viðgerunum.**

### 4.1.2 Stig 2: Staðfesting av møguligum tiltøkum

Tá tað er greitt, hvør váðin er, skulu hesir metast í mun til tey tiltøk sum eru viðkomandi at brúka, so trygdarstøðið er hóskandi. Hvørji tiltøk eru hóskilig veldst um ítøkiligu umstøðurnar um viðgerðarstøðuna eins og staðfestu váðarnar.

[4] Sbrt. § 49 og § 50 í dátuverndarlógini

### 4.1.3 Stig 3: Gjøgnumgongd av tiltøkum sum tryggja hóskandi trygdarstøði.

Í royndu og veru verður ein staðfestur váði vigaður upp ímóti fleiri tiltøkum, sum samanlagt minka um staðfesta váðan. Umframt sjálvan váðan, er viðkomandi at umhugsa hesi viðurskifti, tá rætta tiltakið skal veljast:

- Hvussu fer viðgerðin av persónupplýsingum fram (t.d. hvør viðgerð tær og hvørja viðger er talan um)?
- Hvørji amboð verða brúkt til viðgerðina?
- Í hvørjum samanhangi verður viðgerðin gjørd?

Tað kann vera skilagott at hava einfaldar grundreglur fyri eyga, tá tiltøk skulu veljast. Hetta kann t.d. vera avbyrging og skilnaður av upplýsingum.

**Dømi 1 um viðkomandi tiltøk:**

**Um vandin stendst av, at nógv starvsfólk hava atgongd til nógvar viðkvæmar upplýsingar, ber til at skipa soleiðis fyri, at atgongdin hjá einstaka starvsfólkinum verður skerd. Her ber til hyggja nærri at, hvørji rættindi eru neyðug hjá hvørjum starvsfólki sær. Starvsfólkini fáa síðani júst tey rættindi, og ikki fleiri, sum eru neyðug fyri, so tey kunnu útinna sítt arbeiði. Hesi rættindi kunnu vera at lesa, broyta, heinta, samkoyra ella strika upplýsingar.**

**Dømi 2 um viðkomandi tiltøk:**

**Tað er møguligt at logga viðgerð av persónupplýsingum. Við hesum tiltaki ber til at kanna, hvør hevur framt eina viðger, um talan er um regluliga viðger, ella um óviðkomandi persónar hava atgongd.**

### 4.1.4 Stig 4: Íverksetan av valdum tiltøkum

Her tekur tú avgerð um, hvørji tiltøk skulu gjøgnumførast. Málið er at røkka eitt trygdarstøði sum er hóskandi, í mun til váðan fyri skrásetta.

# 5. Samanumtøka

Tá henda vegleiðing er lisin, kennir tú til høvðustættirnar tá umræður viðgerðartrygd.

Dátuábyrgdari og dátuviðgeri skulu meta um teir váðar, ein viðgerð hevur við sær og teir skulu gjøgnumføra tiltøk sum avmarka hesar váðar.

Dátuverndarlógin krevur, at trygdarstøðið er *hóskandi*. Nær eitt trygdarstig er rokkið veldst um eina ítøkiliga meting. Henda meting skal taka støði í, hvørjir ítøkiligir váðar eru, og hvussu stór sannlíkindini eru fyri trygdarbroti, sum kann elva til at rættindini hjá skrásetta persóni verða brotin.

Dátuverndarlógin tekur støði í váðagrundari tilgongd og tað merkir, at tú skalt hava mannagongdir til  áhaldandi eyðmerkja váðar. Neyðugt er eisini at fylgja við, eftirmeta og greina, hvørja støðu hesir váðar hava, í mun til viðgerðina av persónupplýsingum.

**Vegleiðing**

© 2021 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:

Dátueftirlitið

Sigmundargøta 13

100 Tórshavn

Tlf: 309100

dat@dat.fo

dat.fo

Dátueftirlitið